Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli
og Tórshavnar Listaskúli

2002/2003

FRÍTÍÐIN

– at vera menniskja
– at hava meguleikar
– at taka av arbjóðingum og mennast

Tryggjað av nógstórari undirtøku og myndugleikarna góðkenningbíðar
Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli og Tórshavnar Listaskúli undervising í
hesum lærugreinum skúlaárið 2002/2003:

ENN ERU PLÁSS EFTIR Í HESUM LÆRUGREINUM:

SPRINGFLANTUTING
Tilmelding tlf. 31 36 60
Kr. 670,00 Tysdag 17.00 – 20.30 Margith Glerfoss og Kr. 670,00 Hósdag 17.00 – 20.30 Hørbjørg Dalsgaard – Gamli Fír. Banki

TILSKERING OGSYNING
Tilmelding fyri kl. 19.00 á tlf. 31 04 90
Kr. 670,00 Mánadagur 19.00 – 22.30 Eyð Skívadal Býnti Skúli
Tilmelding tlf. 31 60 25
Kr. 670,00 Mánadagur 19.00 – 22.30 Elinborg Niclsen Býnti Skúli

SKYTING í lyginarvegg fimalsl
Tilmelding tlf. 42 23 48
Kr. 670,00 Mánadagur 19.00 – 22.30 Emly Maria Olsen Høgvíkar Skúli
Kr. 670,00 Hósdagur 19.00 – 22.30 – Høgvíkar Skúli

FERLUSYNING
Tilmelding tlf. 42 10 61 - 22 24 78
Kr. 570,00 Vánadagur Mirian Dam Kollafjørður

TILEVNING
(teking, søking, lir, casefa, lopar og ørkinsøing)
Tilmelding tlf. 31 54 28
Kr. 670,00 Hósdagur 19.00 – 22.30 Margretha Petersen Lærarahúsin
Tilmelding tlf. 31 02 34 - 31 77 55
Kr. 670,00 Mánadagur 19.00 – 22.30 Asa í Fálugstovu Lærarahúsin

POSTLÍNSMÁLING
Tilmelding tlf. 31 23 66 - tlf. 31 77 55
Kr. 670,00 Mánadagur 18.00 – 21.40 Jatnrd Clausen Kollafjørður
Kr. 670,00 Fríggjadagur 16.00 – 19.40 – Kommunuhúsin í tórshavn.

TRÆSMÍÐ
Tilmelding tlf. 31 77 55
Kr. 670,00 Mánadagur 19.00 – 22.30 Sigmund Sørensen Eystnarhúsin, inngongd í Dj. í Geilagøtu
Kr. 670,00 Mánadagur 19.00 – 22.30 – Eystnarhúsin, inngongd í Dj. í Geilagøtu

TRÆSMÍÐ ÆTLAÐ EINI ÁT DREYG
Tilmelding tlf. 31 77 55
Kr. 670,00 Tysdagur 19.00 – 22.30 Bui Fratta berg Eystnarhúsin, inngongd í Dj. í Geilagøtu

LÆRIDATSKERA Í TRÆ
Tilmelding tlf. 31 43 04
Kr. 670,00 Mánadagur 19.00 – 22.30 Nigro Hermansen Eystnarhúsin, inngongd í Dj. í Geilagøtu
Kr. 670,00 Mánadagur 19.00 – 22.30 – Eystnarhúsin, inngongd í Dj. í Geilagøtu

BÓKBINDING
Tilmelding fyri kl. 17 - 21 á tlf. 31 18 47
Kr. 670,00 Mánadagur 18.45 – 22.15 Dagmar Jacobsen Býnti Skúli
Tilmelding fyri kl. 17 - 21 á tlf. 31 18 47
Kr. 670,00 Tysdagur 18.45 – 18.15 Dagmar Jacobsen Býnti Skúli

Tilmelding fyri kl. 17 - 21 á tlf. 31 18 47
Kr. 670,00 Mánadagur 18.45 – 22.15 Dagmar Jacobsen Býnti Skúli

Tilmelding fyri kl. 17 - 21 á tlf. 31 18 47 og tlf. 31 31 36
Kr. 670,00 Hósdagur 14.45 – 18.15 Dagmar Jacobsen og Sonja Dalsgaard Býnti Skúli

VIDEOLÆRA / OPPTIKA
Tilmelding tlf. 21 18 08 - tlf. 31 77 74 eftir nærmari avtalu
Kr. 1.040,00 Ála Simonsen Listaskúlin

SVIMING
Tilmelding tlf. 42 13 68
Kr. 320,00 Tysdagur 19.00 – 20.40 Gunnvá Dam Kollafjørður

SVIMING lo lutgva og fimsvegi
Tilmelding tlf. 31 91 84
Kr. 330,00 Mánadagur 16.00 – 16.45 Hervør Eydnardóttir Lærarahúsin

LÆRIDAT SVIMJA
Tilmelding tlf. 32 02 14
Kr. 330,00 Mánadagur Robert Lilja

KLÁRNUSKEID – byrjar 23. sept.
Fyri fólk, sum vegin er millum lágt 20 kg og eina
Tilmelding tlf. 42 13 80
Kr. 370,00 Mánadagur 16.00 – 18.35 Anne Cæta Hadou

FANLIGT KLÁRNUSKEID – byrjar 23. sept.
Tilmelding tlf. 42 13 80
Kr. 370,00 Fríggjadagur 16.00 – 18.35 Anne Cæta Hadou

MATGERÐARHELLUR ÚTOR
Tilmelding tlf. 42 12 89
Kr. 670,00 Mánadagur 17.00 – 21.00 Edna Einarsson
Kr. 670,00 Tysdagur 17.00 – 21.00 –

FYRSTAHJÁLP / HJARTAMASSASJA OG BRÁFEINESS SÁLARHJÁLP
Tilmelding tlf. 31 78 41
Kr. 420,00 Mánadagur 19.30 – 21.45 Bo Wathne

DRAMA Á DRAMASFERSKTRÁDINUM Á HÍLST byrjar 9. sept.
Undervisnin verður í ymsum teatergrein, sum gera
leguleikarin, t.d. vanjugar í kroppatalu, jarm
spælum, ansprøvum, sodalistik, gráti, improvisatión og leikum.
Tilmelding fyri kl. 16 - 18 tlf. 31 60 28
Kr. 370,00 13-14 ára gomul vera vegna
Tysdagur 17.30 – 19.55 Hjørdís Johansen

16 ár og eldri
Mánadagur 19.00 – 22.30 Hjørdís Johansen
14-16 ára gomul
Hósdagur 18.00 – 21.30 Hjørdís Johansen

TELDULÆRA, inmat og heimasíður byrjar 6. nov
Undervisnin verður í tórshavn
Tilmelding SMS – kort tlf. 2263 37
Kr. 330,00 Mánadagur 19.30 – 21.10 Marek Mir. Markiewicz

ORÐBELINDMÁLSVEIK
Tilmelding tlf. 317755
eftir nærmari avtalu

FØROYSK RÆTTSKRIVINS, MÁLLÆRA OG MÁLREKT
Tilmelding tlf. 31 79 92
Kr. 370,00 Mánadagur 18.15 – 20.30 Eydun á Borg Venjingarskúlin stova 72

FØROYSK FOR SKANDINAVER
Tilmelding tlf. 31 73 30
Kr. 370,00 Mánadagur 20.00 – 21.40 Regin av Steig nam. Venjingarskúlin stova 72

ÍSLENDSKT fimalsl fólkaskúlans
Tilmelding tlf. 31 51 39 – 31 77 55
Kr. 470,00 Mánadagur 19.00 – 21.35 Johanna Thorstadóttir Venjingarskúlin

ENSKT
Lætt 1
Tilmelding tlf. 31 47 66
Kr. 470,00 Mánadagur 18.00 – 19.40 Arnegard Joensen Kommunuskúlin st. 104
Lætt 2
Tilmelding tlf. 31 47 66
Kr. 470,00 Mánadagur 19.30 – 21.20 Arnegard Joensen –
Lætt 3
Tilmelding tlf. 31 77 55
Kr. 470,00 Mánadagur 18.00 – 19.40 Sharon Christiansen Kommunuskúlin st. 105

SPANSKT
Tilmelding tlf. 31 51 32
Framskrivlæra
Kr. 470,00 Tysdagur 20.30 – 22.30 Mark Jimenez Kommunuskúlin st. 101
RÚSSISKT fyri byrjarar og framkomin
Tilmelding tlf. 31 23 78
Kr. 470,00 Mánadagur 19.00 – 22.30 Bozena Rasmussen Kommunuskúlin st. 105

Eykaskeið fyri ansingarstarvsfólk og upplýsingarsamfelag

MATGERÐ byrjar 2. okt.
Tilmelding tlf. 42 13 80
Kr. 300,00 Hósdagur 16.00 – 18.35 Anne Cæta Hadou Eystnarhúsin

UNG LIST BEINISENS HÚS

Bøta og calli
Tilmelding tlf. 31 97 37
Kr. 100,00 Tysdagur 16.00 – 18.30 Randi Gunnarsdóttir Heinesensbís
Kr. 100,00 Tysdagur 18.45 – 21.15 Ranva Jacobsen –

MARGARINSBRUKKIN

MATGERÐ
Tilmelding tlf. 31 22 17
Kr. 100,00 Mánadagur 15.00 – 17.00 Finn Jørgensen Margarinskúlahúsin

GITTAR
Tilmelding tlf. 31 22 17
Kr. 100,00 Mánadagur 15.45 – 18.45 Karl Anton Klein Margarinskúlahúsin

VIDEOSKEID
Tilmelding tlf. 31 22 17
Kr. 320,00 Mánadagur 19.00 – 22.00 Jákup Veyhe –

SANGUR
Tilmelding tlf. 31 22 17
Kr. 100,00 Mikudagur Ranva Jacobsen –

BRIDGESKULI
Tilmelding tlf. 31 91 42 aftanfyri kl. 15.00
tlf. 31 77 55
Kr. 100,00 Mánadagur 19.00 – 21.35 Arnbjørn Sivertsen Fríðgarðsbrúin

Skúlin byrjar mánadagin 21. oktober 2002

Nýtt er at nakla til sum skjótast.

Telefónnummar eru hesar:
Mánadag til hósdag kl. 09.00 – 12.00 og 13.00 – 20.00
Fríggjadag kl. 09.00 – 12.00 og 13.00 – 18.00
Telefax 31 77 55 - telefón: 31 18 47
Kvøldtelefón hjá leiklærum.6

ítróttur

Nr. 192 • týsdagur • 8. oktober 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Genturnar endaðu næstovast

- Høvdu vit havt spælt ímóti Bulgaria í næsta ella triðja dystinum, so ivist eg ikki í, at vit høvdu fingið eitt uppaftur betri úrslit enn 1–1, sigur Álvur Hansen eftir flotta føroyska avrikið í Bulgaria

Nú iðra tær seg um javnleikin ímóti Bulgaria, men tær eru longu farnar at gleða seg til kappingina næsta ár

U-19 KVINNUR
Jóannes Hansen

Í gjárkvøldið skuldi U–19 kvinnulandsliðið koma aftur í Vágar. Tá høvdu tær ferðast síðani klokkan hálvgum tíggju sunnukvøldið. Fyrst koyrdu tær í bussi í sjey tímar tvørtur um alt Bulgaria, síðani fóru tær í flogfari til München og so aftur til Keypmannahavnar.

– Vit eru troytt, men vit eru sera væl nøgd við ferðina og avrikini.

Tað segði Álvur Hansen, venjari, tá vit fyrrapartin í gjár fangaðu hann á í München.

Fríggjadagin vann føroyska liðið 2–0 á Litavia, og sunnudagin taptu føroysku genturnar 5–1 ímóti Onglandi.

– Ímóti Litavia spældu vit sera væl. Vit vóru greitt omaná, og vit høvdu møguleikar at fáa uppaftur fleiri mál. Málini, sum vit fingu, vóru sera góð. Selma Dahl Erol skoraði fyrra málið í 35. minutti. Ása á Neystabø sendi á samankomingina, ogso fingu hinar bóltin út til innkast. Selma var í vinstru, tá hon fekk bóltin og smekkaði í handara síðunetið úr stórari fjarstøðu. Seinna málið kom, tá 55 minuttir vóru farnir. Selma legði innfyri úr vinstru, og Ása kom fram um verjuna, og við nærra stólpan stútaði hon upp í nettakið. Sera gott mál.

Hóast Føroyar taptu 5–1 ímóti Onglandi, so er venjarin væl nøgdur. Hann vísir á, at tølini boða frá góðari framgongd. Tá Føroyar í 1998 og í 1999 spældu ímóti Onglandi var talan um heilt stór tap, og Ongland er ikki hvat sum helst. Fyrr í ár vóru tær við í HM endaspælinum í USA. Tá rukku tær í fjórðingsfinaluna og vóru harvið millum átta tey bestu liðini í heiminum.

– Í 1. hálvleiki vóru vit hampuliga væl við, men eftir steðgin vórðu okkara kroystar heilt í botn. Men tað var harmuligt, at tær skuldu skora til 5–1 í yvirtíðini, heldur venjarin, sum greiðir soleiðis frá føroyska málinum:

– Elin Katrina Haraldsen smekkaði úr 30 metrum og upp um málverjan, sum var einar fimm metrar framman fyri málstrikuna. Tað var eitt fint mál, og so var tað stuttligt at sígga, at hon brúkti við vinstra beinið, tí hon plagar annars at sparka við høgra beini. Burtursæð frá málinum høvdu vit so at siga ongan møguleika. Eina ferð í 1. hálvleiki var um reppið, at Maibritt Olsen megnaði at bróta ígjognum, men hon varð steðgað, áðrenn tað gjørdist rættuliga vandamikið.

Spennandi framtíð

Flestu av gentunum á hinum liðunum eru føddar í 1984. Fleiri av føroysku gentunum eru føddar í 1986. Tað vil siga, at tær kunnu spæla í tvey ár afturat, og tað leggur upp til spennandi kappingar komandi árini. Fýra gentur verða ov gamlar komandi ár. Tær eru Maibritt Olsen, Rósmari Haraldsen, Elsa Maria Simonsen og Petra Sjóstein.

– Fleiri av teimum, sum upprunaliga vóru á beinkinum, komu inn og spældu væl. Tað var neyðugt at skifta út, tí fleiri vóru so móðar. Eitt nú KÍ genturnar Elsa Maria Simonsen og Petra Sjóstein. Tær høvdu í vikuni frammanundan spælt tveit harðar dystir fyri KÍ í Europa Cup, so tær fingu seg rættuliga royndar.

Føroyska liðið endaði á øðrum plássi. Ongland vann kappingina við fullum stigatali, Føroyar fingu fýra stig, Litavia trý og bulgarsku vertirnir fingu bara stigið í 1–1 javnleikinum ímóti Føroyum:

– Nú aftaná iðra vit okkum um, at vit spældu ímóti Bulgaria í fyrsta dystinum. Vit hava altíð trupulleikar í fyrsta dystinum, tí vit spæla ongar týdningarmiklar venjingardystir. Høvdu vit havt spælt ímóti Bulgaria í næsta ella triðja dystinum, so ivist eg ikki í, at vit høvdu fingið eitt uppaftur betri úrslit enn 1–1, sigur Álvur Hansen.

Útlitini eru góð fyri komandi ár. Ynskið hjá føroyska liðnum er, at tær verða eitt sindur hepnari í lutakastinum, so tær ikki nýtast at fara so langt eystur í Europa at spæla.

Manningin

Ímóti Litavia sá føroyska liðið soleiðis út: Randi Wardum – Heidi Hansen, Rósmari Haraldsen, Petra Sjóstein – Elin Katrina Haraldsen (Unn Kragesten, 83.), Asta Magnussen, liðformaður, Elsa Maria Simonsen (Maria Mikkelsen, 90.), Ása Christiansen (Kristina D. Simonsen, 68.), Selma Dahl Erol – Maibritt Olsen, Ása á Neystabø.

Petra Sjóstein fekk gula kortið í 57. minutti.

Ímóti Onglandi sá liðið soleiðis út: Randi Wardum – Unn Kragesten, Asta Magnussen, liðformaður, Heidi Hansen – Selma Dahl Erol (Mary–Ann Isaksen, 75.), Elin Katrina Haraldsen, Kristina D. Simonsen, Maria Mikkelsen (Elsa Maria Simonsen, 55.), Petra Sjóstein (Linda Weihe, 65.) – Maibritt Olsen, Ása á Neystabø.

Kristina D. Simonsen fekk gula kortið í 69. minutti.

Ongland vann 5–0 á Bulgaria og 4–0 á Litavia, og Litavia vann 4–0 á Bulgaria.